# *UPPSKOT TIL*

## *Stovningarsamtykt og viðtøkur fyri eitt íverksetarafelag*

Útgivið av

Skráseting Føroya

Tillagað mars 2023

Skráseting Føroya · Sigmundargøta 13 · Boks 264 110 Tórshavn · Tlf.: +298 356010 · Fax: +298 356015 · E-mail: skr@skraseting.fo

# Dømi um stovnan av íverksetarafelag (bert kontant inngjald)

**Stovningarskjal fyri ÍVF (*Navn verður sett inn*)**

Undirritaðu
*(Navn og adressa hjá stovnara/um verður sett inn)* hevur/hava í dag avgjørt at stovna eitt íverksetarafelag við navninum

ÍVF *(navn verður sett inn)*
grundað á fylgjandi:

Felagið verður stovnað við kontantum inngjaldi á kr. xx til kurs 100. *(Størri upphædd og/ella hægri kursur kan setast inn)*

Kapitalurin er ikki býttur í partar *(Annað býti kann setast inn)* Kostnaðurin ið stendst av stovnanini verður at gjalda av felagnum, og verður væntandi: *(kostnaðurin setast inn)*

*(Um nevnd verður vald)*
Í nevnd felagsins eru vald *(nøvn verða sett inn.)*

Sum stjóri er valdur *(navn verður sett inn)*

*(Um grannskoðari verður valdur.)*
Sum grannskoðari er valdur *(navn verður sett inn)*

*(Um grannskoðari ikki verður valdur skal tilskilast at grannskoðan er frávald)*
Grannskoðan er frávald.

*(Um nevnd er vald)*
Eftir aðalfundin var nevndarfundur hildin og skipaði nevndin seg við *(navn verður sett inn)* sum formanni.

Fyri felagið skulu hjáløgdu viðtøkur vera galdandi.

Sum stovnarar:

*(Staður og dagfesting verður sett inn)*

**Viðtøkur fyri ÍVF *(navn verður sett inn).***

§ 1
Navn felagsins er ÍVF *(navn verður sett inn)*
*(Møgulig hjánøvn verða sett inn)*
(Tað er ikki krav at heimstaður skal standa í viðtøkunum. Tað ber tó til at seta felagsins heimstað í viðtøkurnar.)

§ 2
Endamál felagsins er at reka virksemi við (*set inn felagsins endamál)* umframt annað virksemi í hesum sambandi.

§ 3
Kapitalurin er kr. xx býttur í kapitalpartar á kr. 1,00 ella margfald av hesi upphædd. *(Størri ella minni upphædd og/ella annað býti kann setast inn)*

Á aðalfundi eigur hvør kapitalpartur eina atkvøðu fyri hvørjar 1,00 kr. *(Onnur upphædd kann verða sett inn)*

§ 4
Kapitalpartarnir skulu ljóða uppá navn og vera skrivaðir inn í eigarabók felagsins. Kapitalpartarnir skulu ikki vera umfaraskjøl.

§ 5
Aðalfundur verður fráboðaður 14 dagar frammanundan elektroniskt ella við brævi til hvønn einstakan kapitaleigara. Brævið skal innihalda fundarskrá við tilskilan av fundarstaði og tíð. Av fundarskránni skal síggjast hvørji mál, ið skulu viðgerast á aðalfundinum.

§ 6
Felagið verður stýrt av einum á aðalfundi valdum stjóra. Stjórin verður valdur fyri eitt ár í senn.

*(Um nevnd er vald kann § 6 ljóða soleiðis):*
Felagið verður stýrt av eini á aðalfundi valdari nevnd ið hevur 1 – 3 limir. Nevndarlimir verða valdir fyri eitt ár í senn. *(Tað er er frítt at áseta talið á nevndarlimum sjálvi)*
Nevndin setir eina stjórn.

§ 7
Felagið verður teknað av einum stjóra.

*(Um nevnd er vald, skal nevndin kunna tekna felagið eisini, og kann § 7 tá ljóða soleiðis):*
Felagið verður teknað av einum stjóra ella av allari nevndini í felag. *(Onnur tekningarregla kann setast inn, eisini um onnur leiðsluskipan er vald)*

§ 8
Á hvørjum ársaðalfundi verður støða tikin til, um felagið ynskir ársroknskapin grannskoðaðan. Aðalfundurin kann velja ikki at hava grannskoðan, um ársroknskaparlógin heimilar hesum.

§ 9
Roknskaparár felagsins er frá *(dagfesting verður sett inn)* til *(dagfesting verður sett inn)*
Fyrsta roknskaparár gongur frá stovnan felagsins til *(dagfesting verður sett inn)*

*(Staður og dagfesting verður sett inn)*